Grundgeving Vinnuátakið 2019

Í 2050 verða vit 9,7 milliardir fólk í heiminum. Hóast jørðin helst rúmar so nógvum fólkum, so eru tað tó fleiri og fleiri, sum spyrja, um vit ikki noyðast at broyta okkara tankagongd og hugburð, um heimurin framvegis skal vera eitt liviligt stað. Hesi halda, at vit mugu førka okkum burtur frá bara at brúka og blaka burtur. Í staðin skulu vit endurnýta og royna at fáa sum mest burturúr tí tilfeingi, sum vit hava um hendi.

Og rákini eru longu týðilig, eisini her heima hjá okkum: Innan matvørur verður dentur lagdur á at minka um matoyðsl. Innan fiskatilfeingi royna vit at fáa gagn burturúr øllum fiskinum, eisini tí, sum fyrr varð blakað burtur. Og innan klædnamóta avloysir slow-fashion og endurnýtsla í alsamt størri mun fast-fashion. Gamli drongurin, sum altíð hevur búð heima hjá foreldrunum, og sum altíð hevur gingið í teimum somu gomlu klæðunum, er brádliga vorðin hipstari og eitt stíl-ikon.

Tað er tó ikki bara her hjá okkum, at vit síggja hesi rák. Bilaframleiðarar brynja seg til eina framtíð, har ein stórur partur av okkum fara at koyra í el-akførum, og har orkan verður framleidd úr burðardyggum orkukeldum. Og tað er stórur áhugi fyri at hita húsini við ymiskum el-riknum skipanum, eitt nú hitapumpum. Um slíkar skipanir skulu gera mun, mugu vit tó eisini hyggja nærri eftir, hvussu streymurin verður framleiddur.

Í Føroyum hava vit nógvar burðardyggar orkukeldur, sum vit kunnu troyta. Nógv fokus er á vindorkuna, sum bæði er og verður nógv útbygd. Og hóast tað í teirri myrku tíðini ikki altíð tykist sum ein realistiskur møguleiki, er tað nógv sum bendir á, at eisini sólorka kann nýtast sum ein lutfalsliga bíligur háttur at framleiða el í Føroyum.

Tað er tó ikki altíð, at vit síggja allar teir upplagdu møguleikarnar, sum eru beint fyri nøsini á okkum. Fara vit nøkur áratíggju aftur í tíðina, høvdu nógvir føroyingar neyt í kjallarinum. Umframt at geva familjuni mjólk, var kúgvin eisini við til at hita húsini, sum familjan búði í.

Seinnu árini hevur alilaksur yvirhálað kúnna sum alidjór nr. 1 i Føroyum, men møguleikarnir at fáa orku burturúr laksaframleiðsluni eru eisini góðir. Hóast laksur sum eitt djór við kaldum blóði ikki gevur tann stóra hitan frá sær, hava verkfrøðingar og onnur við tekniskum innliti tó funnið ein snildari hátt at gagnnýta avlopsorkuna frá alidjórum í bæði land- og havbúnaðinum: biogass gjørt burturúr skarni frá smoltstøðunum, deyðum fiski, mykju frá landbúnaðardjórum og øðrum lívrunnum tilfari.

Í grannalondunum hevur tað í fleiri ár verið vanligt við biogassverkum, men í Føroyum hevur tað higartil verið eitt sindur trekt at koma í gongd, hóast bæði eldsálir og orkumyndugleikarnir hava víst á møguleikan. Men bara higartil. Tí um nakrar fáar mánaðar verður fyrsta føroyska biogassverkið tikið í nýtslu uppi á Hjalla, nærhendis Sundsverkinum.

Nýggja verkið hevur møguleika at framleiða el, sum svarar til nýtsluna hjá 1.900 húsarhaldum og harafturat hita svarandi til 400 húsarhald. Sostatt kann verkið tilsamans spara uml. 11.000 tons av CO_2 útláti árliga.

Samstundis framleiðir verkið uml. 40-45.000 tons av tøðum, sum bóndurnir kunnu fáa aftur. Góðskan á avgassaðu tøðunum er hægri enn á tí óviðgjørdu mykjuni, sum bóndur vanliga brúka at taða við, og frárenslið frá landbúnaðinum í áir, vøtn og firðir væntast at minka í mun til í dag. Sostatt minkar nýggja biogassverkið bæði ein lokalan og ein globalan umhvørvistrupulleika, samstundis sum landbúnaðarframleiðslan verður meira effektiv.

Frá tí, at eigararnir av nýggja biogassverkinum byrjaðu at leggja ætlanir um nýggja verkið, er kapasiteturin á verkinum tvífaldaður, so tað betur er fört fyri at nøkta núverandi og komandi tørv.

Um vit vilja broyting og menning, mugu vit javnt og samt førka okkum. Vit førka okkum, tá vit síggja nýggjar møguleikar, og tá vit gera okkara part fyri at loysa størri og smærri avbjóðingar fyri okkum sjálvi, samfelagið og fyri heimin. Og tað er júst tað, sum Vinnuátakið 2019 hevur gjørt.

Dómsnevndin hevur tí verið samd um, at Vinnuátakið 2019 er nýggja biogassverkið P/F FÖRKA, sum Bakkafrost eigur.